

# Vespan

2026

NSÍ RUNAVÍK F.C. - B36 TÓRSHAVN

LEYGARDAGUR 13. JUNI 2026 - KL. 19:00 VIÐ LØKIN

# FORMAÐURIN



Karstin Joensen
Formaður NSÍ

Hjartaliga vælkomin á Eystanstevnu!

Eystanstevna, leygarkvøld og toppdystur í Meistaradeildini við Løkin. Tað fær neyvan verið nógv betri. Tað eru trý lið, ið liggja nr. 1 við júst sama stigatali. Tað er bara málmunurin, ið skilir liðini at.

Vit taka í dag ímóti B36, ið saman við okkum og KÍ liggja fremst. B36 hevur havt eitt frálíkt kappingarár inntil víðari, har teir enn ikki hava tapt ein dyst. Teirra 5 javnleikir gera tó, at dagsins lið liggja jøvn í stigum, hóast okkara gulu hava tapt tveir dystir.

Søguliga sæð plaga hesi bæði liðini altíð at spæla undirhaldandi dystir. Tað verður lopið á og tað koma altíð mál. Hvør minnist ikki fyrsta dystin seinasta kappingarár, ið endaði við einum 4-3 heimasigri, tá Brandur H. Olsen við eini perlu avgjørdi í 95. minutti. Og tá kundi útiliðið beint áðrenn havt stolið sigurin.

Annars hoyrir man ofta, at stevnurnar eru ikki tað sama sum fyrr. Tað er nokk natúrligt, nú so nógv tiltøk og festivalar eru at velja í. Eg vil tó siga, at Eystanstevnan er lend á einum ógvuliga hugnaligum staði. Eitt av størstu økjunum í landinum má hava eina stevnu.

Dagurin í dag, leygardagurin, bjóðar millum nógv annað uppá FM-kappróður, ponyríðing, hoppiborgir, NSÍ-kafé, Quiz og 'syngið við'-tiltaki í stóra teltinum. Stevnan endar við eini hugnaligari kvøldsetu sunnukvøldið kl. 20. Eystanstevnan er komin aftur fyri at vera.

Tað er eisini hópin av øðrum fótbólti við Løkin hesar dagarnar. Tað er einki so stuttligt, sum at síggja ein fullan vøll av børnum og ungdómum, ið spæla heimsins stuttligasta spæl.

Dysturin í dag hevur sjálvandi sera stóran týdning, tí NSÍ, KÍ og B36 liggja stavn um stavn, nú kappingin er við at koma í helvt. Vit hava bara truplar og týdningarmiklar dystir hesumegin summarfrítíðina, so tað ræður um at vinna og hanga í.

Góðan dyst og framhaldandi góða Eystanstevnu. Passi uppá tykkum sjálvi og hvønn annan.

Saman standa vit sterk!

XL BYG
BORG

LAVAZZA
ARBEIÐARAFELAGIÐ HÆDDIN
elcon

Ábyrgd: NSÍ RUNAVÍK F.C. www.nsi.fo
Karstin Joensen, Formaður.

Blaðnevnd: Stig Davidsen
Myndir: Hjalmar Jóhan Juul

Prent og Uppseting: Bókabúðin, www.bokabudin.fo




Innflutningur *Import* | Útflutningur *Export* | Skipaavgreiðsla *Agency & Bulk* | Innlendiskoyring *Domestic Transp.* | Faroe Express *Forwarding* | Vøruhotell *Warehouse* | Frystigoymsla *Cold Storage* | Oljuútgerðarhavn *Supply Base*

FAROE SHIP

Tel (+298) 349 000 | www.faroeship.fo

Reklamu PRENT

Skeltir . Klisturmerkir . Bildeko . Klædnaprent

Reklamuprent Sp/F · við Ánna 70 · FO-512 Norðagøta · tel: 780780 · e-mail:rp@rp.fo

LEMVIGH-MÜLLER

www.lemu.fo

HAMMER·SMÍÐ
Tel. 22 40 30






















BYGGIRÁÐ
51 97 49
byggirad@byggirad.fo

KANJON

## STØÐAN

FAROE SOCCER.com
Meistara Deildin

| NR. | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ↑ | KÍ | 12 | 7 | 5 | 0 | 25 | 8 | +17 | 26 |
| 2 | B36 | 12 | 7 | 5 | 0 | 25 | 10 | +15 | 26 |
| 3 ↓ | NSÍ | 12 | 8 | 2 | 2 | 23 | 13 | +10 | 26 |
| 4 | Víkingur | 12 | 4 | 6 | 2 | 14 | 9 | +5 | 18 |
| 5 | HB | 12 | 4 | 3 | 5 | 16 | 18 | -2 | 15 |
| 6 | AB | 12 | 4 | 2 | 6 | 17 | 20 | -3 | 14 |
| 7 | B68 | 12 | 3 | 3 | 6 | 17 | 30 | -13 | 12 |
| 8 ↑ | Skála ÍF | 12 | 2 | 4 | 6 | 11 | 15 | -4 | 10 |
| 9 ↓ | EB/Streymur | 12 | 2 | 3 | 7 | 11 | 19 | -8 | 9 |
| 10 | 07 Vestur | 12 | 2 | 1 | 9 | 6 | 23 | -17 | 7 |




Klæðini til hennara
FÆRT TÚ SJÁLVANDI
Í SHOP-IN
Shop-In
625 GLYVRAR
22 72 60


Bilasølan
STUÐLAR
RUNAVÍK NSÍ 1957 FOOTBALL CLUB
ŠKODA
Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.


HOLM
BYGGING
• BYGGIVIRKI
• RÁÐGEVING
21 56 00
mhj@holmbyg.fo


RUNAVÍKAR KOMMUNA
YNSKIR NSÍ
GÓÐA EYDNU
RUNAVÍK NSÍ 1957 FOOTBALL CLUB
RUNAVÍKAR KOMMUNA


UMVÆLING AV ØLLUM BILA SLØGUM
BBR
SERVICE
HJÁ OKKUM VERÐA VIÐSKIFTAFÓLK OKKARA
ALTÍÐ SETT Í HÁSÆTI
Vit hava opið frá
08:00 til 16:10
SKRIÐUGØTA 18,
FO 626 LAMBAREIÐI
TLF 44 91 11


Fønix
Mykinesgøta 8 www.fonix.fo +298 31 19 09
Eldsløkkjarar
Til heimið, bátin, skipið, stovnin ella fyritøkuna ...
Ávaringar
Tørv á royk, vatn, CO ella hita ávaringum - vit eru her at hjálpa tær ...
Fyrstuhjálp
Alt frá heftiplástur til góðkent fyrstuhjálparskeið fæst hjá okkum ...
Bjargingarútgerð
Bjargingarbelti, flótidrakt, bjargingarbát, og nærum alt til bátin - fæst í Mykinesgøtu 8 ella á www.fonix.fo ...


G-Cargo
Flutningur
Tel. 22 46 12
gdolum@gmail.com
G-Cargo


ATEK


FAXE
KONDI
FAXE
KONDI

NSÍ'arin



Djóni Nolsøe Joensen

# Hvat er tað sum dregur okkum at NSÍ?

Oftani verður spurt um hví vit halda við tí og tí liðnum. Og hvat tað er sum ger, at vit framhaldandi gera tað. Til tess krevst, at nakrar fortreytir eru og vera uppfyltar.
Og tað livir felagið NSÍ upp til ídag.

Eitt tað týdningarmesta fyri eitt felag er, at tingini eru væl skipaði og at ordan er í. Tað er tað ídag hjá NSÍ. Vit hava eina vælvirkandi stabila nevnd og álitisfólk har.

Eftir mínum tykki hava vit eitt felag í javnvág. Hettar bæði tá tað kemur til tann fíggjarliga og ítróttarliga partin. Av tí skapast álit.
Felagið hevur eina strategi og eina visjón og sum hildin verður fast í.
Støðufesti – at hóast skiftandi venjarar/leikarar koma og fara - felagið og visjónin er tann sama. Tað eru hesir sum skulu umstilla seg til felagið og ikki umvent.

Mest lokalir leikarar, so lokala fólki og familjurnar tíma at koma at hyggja og kenna seg aftur í teimum á vøllinum.
Felagið og venjarar, sum taka sær væl av okkara børnum og sum skapar góða felagskapskenslu. Tí leggjast fólk afturat og gera fegin eyka innsatsir fyri felagið sum sjálvboðin, bæði sum innkrevjarar, kiosk hjálp o.s.fr.
Ongin og onki er størri enn felagið. Tað er tað besta. Jú meir felagið er forankrað við fólkið á staðnum og tey kenna seg væl í tí, tess betri virkar tað. Skil er í. Tað er tí vit øll vera drigin at NSÍ og kenna okkum væl í tí :-)

Dysturin í dag er millum tvey lið sum liggja í oddinum í deildini og sum eru í góðum stimum fyri tíðina. Harafturat eisini stevnudystur. Hesir eru altíð nakað serligt, ella eiga at vera tað. Hesin onki undantak. Hvítu tikararnir plaga at koma í bussum inneftir og tað, saman við okkara kulu og larmandi Guliganz, eigur at borga fyri eini festligari kulissu til toppbrakið. Uttanfyri vøllin eru vit longu føroyameistarar, without a doubt :-)
Vit skulu vera nøgd við avrikið hjá okkara liðið higartil í kappingini. Vit hava eitt gott mix av eldri og yngri leikarum, lokalum og góðum útlendskum leikarum.
Men fari samstundis at loyva mær at koma við nøkrum tingum sum eiga at kunna gerast væl betri. Um vit ætla okkum at vera við heilt har frammi, so sakni eg til tíðir meir kynismu. At vit lukka dystir av har spælið kanska ikki hevur verið av tí besta og spæla ein javnleik heim, um ikki annað.

Seinasta dømi var á Argjum. Her saknaði eg eisini meir villskap frá okkara leikarum. Tað sýntist sum AB ´arnir vildu tað nógv meir, vunnu nærdystirnar og kempaðu allar 90 minuttirnar. Tað er ikki nokk hjá okkum bara at spæla væl í løtum og tá ið spælið ikki altíð gongur eftir vild, ja so má kempast ístaðin og ikki vera bangnir fyri um tað sær sindur ljótt út fyri at fáa neyðugu stigini. Tingini koma ikki av sær sjálvum, arbeiðast má hart fyri tí, allan dystin á tamb.

Síðst, men ikki minst so var tað sera hugstoytt at síggja, at yngsti og lægsti leikarin hjá okkum í avgerðandi hornasparkinum í dystinum skal standa einsamallur og dekka hægsta og sterkasta luftvápnið hjá teimum, og sum var settur inn til júst hettar. Her sakni eg, at onkur av okkara garvaðu og eldru leikarum tóku ábyrgd og dekkaðu mann til mann og eftir støðu. Lætt at vera bak-klókur, men onkuntíð skulu slík basic ting vera í ordan fyri at fáa úrslit og stig heim við.

Vit sóu eisini í dystinum á Argjum, at teir høvdu ein ungan óroyndan málmann og sum týðuligt ikki var tryggur við innlegg. Tíverri høvdu vit bara tvey innlegg, kanska trý, í øllum dystinum og bæði góvu mál. Hví ikki fleiri innlegg??

Eitt annað sum í seinastuni hevur verið nógv at hoyrt millum áskoðararnar og sum eg eri púra samdur í er, at lata leikararnar spæla í teirra røttu uppruna plássum á vøllinum. Hettar skríggjar til himmals og fyri uttanfyri standandi sær hettar beinleiðis tápuligt út og óskiljandi. Her burdi verið handla.
Fáa vit oppa okkum her og fínjustera nøkur av hesum tingunum, so eri eg sannførdur um, at vit heilt fram til kappingarenda í heyst, enn eru við í FM stríðnum. Koyri á dreingir.

SAMAN STANDA VIT STERK

OCD
RED Line










KJØLUR
Stangavegur 3 - 700 Klaksvík - Tel. 47 11 30 - www.kjolur.fo

KASSA MIÐSTØÐIN
Miðstøin P/F. Toftagjógv 5. FO-650 Toftir. Tel 449950 Faks 449953. post@kassi.fo. www.kassi.fo










SKELTI

Eysturoyar Bókhaldsstova
Heiðalon - Heiðavegur 31 - FO-600 Saltangará
Tlf.: 74 32 07 - eysbok@gmail.com

GOTT

# MÁL

FAROE SOCCER.com · Meistara Deildin

| LEIKARI | LIÐ | MÁL | BROTSSPØRK | MINUTTIR | MIÐAL | DYSTIR |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Árni Frederiksberg | KÍ | 6 | 2 | 1079 | 0,50 | 12 |
| Bogi Reinert-Petersen | B36 | 6 | 3 | 953 | 0,55 | 11 |
| Simon Jørgensen | Skála ÍF | 6 | 3 | 1080 | 0,50 | 12 |
| Loick Lespinasse | B68 | 5 | 0 | 588 | 0,56 | 9 |
| Petur Knudsen | NSÍ | 5 | 0 | 1072 | 0,42 | 12 |
| Torgeir Børven | B36 | 5 | 0 | 849 | 0,42 | 12 |
| Dávid Andreasen | B36 | 4 | 0 | 906 | 0,33 | 12 |
| Marius Kryger Lindh | NSÍ | 4 | 0 | 973 | 0,33 | 12 |
| Michal Przybylski | NSÍ | 4 | 0 | 655 | 0,33 | 12 |

BÓNUS



Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

A Member of The Linde Group

AGA-FØROYAR



AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

PETUR

sp/f thePetur
Heiðavegur 15, 2A tv
600 Saltangará
+298 50 85 75
petur@thepetur.com

Meistara Deildin

NSÍ Runavík Football Club 1957

1 Kristian Joensen (M)
2 Adrian Edqvist
3 Viljormur Davidsen
4 Daniel Obbekjær
5 Alex Freyr Elísson
6 Beinir Nolsøe
7 Aron Knudsen
8 Brandur H. Olsen
9 Tobias Hestad
10 Klæmint A. Olsen (L)
11 Marius Kryger Lindh
16 Petur Knudsen
17 Jann Julin Benjaminsen
18 Mórits Heini Mortensen
23 Diktus Olsen
24 Betuel Hansen
28 Markus Danielsen
29 Emil W. Joensen
33 Michael Przybylski
13 Tom Amos (M)
30 Dánial Danielsen (M)

Venjar: Sigurður Ragnar Eyjólfsson



Eiler Rasmussen

Fótbóltsfelagið B36 F.C. Tórshavn

1 Silas Eyðsteinsson
28 Mattias Joensen
18 Dávid Andreasen
11 Torgeir Børven
20 Djóni Sivertsen
8 Ragnar Samuelsen
22 Bogi Reinert-Petersen
10 Boubacar Dabo
24 Bartal Páll Klein
23 Heini Vatnsdal
9 Hannes Agnarsson
26 Rói Hansen
14 Jógvan Gullfoss
7 Símun Sólheim
21 Tobias Hansen
15 Gilli Samuelsen
5 Børge Petersen
Leivur Guttesen
3 Bergur Poulsen
19 Rani í Soylu
27 Tórur Eið Eliasen
12 Heini Guttesen
25 Hans Jørgensen

Venjari: Jákup Martin Joensen

Vitja nethandilin RB.FO
... eitt »KLIKK« frá vøruni

elcon

2 STEPS

ARBEIÐARAFELAGIÐ HÆDDIN



KOYRIKORT
TIL BIL ELLA MOTORSÚKKLU
- Lat meg hjálpa tær
ANDREA
ANDREA ISAKSEN KOYRILÆRARI
21 16 87
kiki@olivant.fo




A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo




á Rituvíkshálsi
DEKK SERVICE
DEKK SERVICE
Umvæla sýnskrossar
Góðkendir av Akstovuni til umsýn
Leiga bilar út - Skifta dekk - Skifta olju
Umvæla bremsur - Upphang - útstoyt
Spora - og aðrar umvælingar
RING á Tel. 44 59 00 og avtala tíð
Ennigøta 3 - FO-640 Rituvík




Fønix
Mykinesgøta 8 www.fonix.fo +298 31 19 09
Eldsløkkjarar
Til heimið, bátin, skipið, stovnin ella fyritøkuna …
Ávaringar
Tørv á royk, vatn, CO ella hita ávaringum – vit eru her at hjálpa tær …
Fyrstuhjálp
Alt frá heftiplástur til góðkent fyrstuhjálparskeið fæst hjá okkum …
Bjargingarútgerð
Bjargingarbelti, flótidrakt, bjargingarbát, og nærum alt til bátin – fæst í Mykinesgøtu 8 ella á www.fonix.fo …




NSÍ
hummel




RTS
KANJON
hummel
NSÍ





# BAKKAFROST - EIN FØROYSK FYRITØKA Í HEIMSFLOKKI

Bakkafrost samtakið er einasta alisamtak í heiminum, har virðisketan fevnir heilt frá framleiðslu av fiskamjøli og lýsi (ið verður nýtt til fóður) til lidna vøru. Laksurin verður síðani útfluttur sum hágóðskuvøra til góðskutilvitaðar kundar kring allan heim. Eftir liggur ein stór virðisøking í Føroyum.



FISKAMJØL OG LÝSI



FÓÐUR



SMOLTALING



SJÓGVALING



GÓÐSKING



SØLA

BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

WWW.BAKKAFROST.COM


NAVIGARE
BAKKAFROST



ATLANTIC AIRWAYS

KSS

NAVIGARE

VOYT


Føroya Bjór



Kom í læru
hjá okkum
Les meira á bankin.fo/naemingur
Føroya Banki

PF BLIKKSMIÐJAN
TEL: +298 455579 | E-mail: blikk@blikk.fo

VESTPACK

BYGGIVERK
25 07 31
"Vit átakað okkum alt innanfyri timbur -og betongarbeiði"




LEMVIGH-MÜLLER
www.lemu.fo

Vit veita tænastur innan

Grannskoðan
Roknskap
Bókhald
Skatt
Fíggjarviðurskifti

Grannskoðara
stovan
skrásett grannskoðanarvirki

59 16 16
gs@gs.fo
gs.fo



KEN NÓNKLETT
advokatur




»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«
ADVOKATFELAGIÐ
LUCAS DEBESAR GØTA 8 · TEL 203040 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · EYÐIN DJURHUUS · JULIANNA KLETT




OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta
um framtíðina,
mást tú kenna
fortíðina
SENDISTOVAN
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO




TÁ RÆTT
SKAL
VERA
RÆTT
ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · WWW.JURA.FO

NAVIGARE
SHIPPING



# SANDUR OG SKERVUR

AV ØLLUM SLØGUM OG STØDDUM

## BIG BAGS

OG SMÁAR SEKKIR

20 30 31

navigare.fo/sandgoymslan